# FRÁGREIÐING

VIRKSEMIÐ HJÁ
NORÐOYA BÚ- OG HEIMATÆNASTU
2015-2024





# INNIHALD


**NORÐOYA BÚ OG HEIMATÆNASTA** 4
Virðisgrundarlag og strategi 5
Skipan 6
Eldraráðið 8
Starvsfólk 8
Borgarar 10

**TÆNASTUR** 11
Heimatænastan 12
Ven og Virka, Fysio- og ergoterapieindin 18
Eginvenjing 23
Samdøgursrehabilitering 23
Mattænasta 24
Fyribyrgjandi heimavitjanir 24
Stuðul til reingerð 30
Dagtilhald 31
Sjálvboðið arbeiði 35
Virkishúsið Smæran 35
Umlætting 36
Ansing 38
Búeindir 40

**DEMENSÆTLAN** 45

**KORONA** 47

**STARVSFÓLKAMENNING** 48

**TALGILDA HEILSUSKIPANIN COSMIC** 49

**AVBJÓÐINGAR OG FRAMTÍÐARÆTLANIR** 51
Starvsfólk 51
Nýbygging 55
Demografi 58

**FÍGGING** 60

## NORÐOYA BÚ- OG HEIMATÆNASTA

*Tær fimm kommunurnar í Norðoyggjum, Fugloyar-, Viðareiðis-, Hvannasunds-, Kunoyar- og Klaksvíkar kommuna, hava skipað seg í javnbjóðis samstarv[1] um eldrarøkt og heimatænastu v.m. undir heitinum Norðoya Bú- og Heimatænasta, stytt NBH.*

*1 https://nbh.fo/wp-content/uploads/2017/06/avtala-um-javnbjis-samstarv-millum-kommunurnar--noroyggum.pdf*
*2 https://nbh.fo/wp-content/uploads/2017/07/ngdsemiskanning-nbh-august-2016-almenn.pdf*



## VIRÐISGRUNDARLAG OG STRATEGI

Tá ið eldraøkið tann 1. januar 2015 varð flutt kommununum at umsita, avgjørdi stýrið fyri NBH, ikki at gera stórar broytingar á økinum beinanvegin. Stýrið setti sær hinvegin fyri at nýta fyrstu tíðina til umfatandi og nágreiniligar kanningar av eldraøkinum, so haldgott grundarlag fekst fyri at leggja eina strategi fyri framtíðarvirksemið hjá NBH.

Kanningararbeiðið fevndi bæði um kvalitativar dialogfundir við brúkarar, avvarðandi, starvsfólk og aðrar fakbólkar. Eisini varð umfatandi nøgdsemiskanning[2] gjørd, har teir brúkarar, ið kunnu svara fyri seg, ein avvarðandi umboðandi hvønn brúkara og øll starvsfólk vórðu spurd.

Kanningarnar avdúkaðu nøkur felags virðir, sum hava týdning fyri brúkarar, avvarðandi og starvsfólk. Tey eru:

- → **Nærvera**
- → **Fleksibilitetur**
- → **Álit heldur enn eftirlit**

Hesi virðini eru somuleiðis grundarlagið undir visjónini, sum er orðað fyri NBH:

**NBH strembar eftir at skapa fjøltáttaðar møguleikar fyri nærveru, eldri borgarum, avvarðandi og starvsfólkum at gagni.**

**NBH vil raðfesta fleksibilitet og samskapan í teimum loysnum, ið framyvir skulu finnast á eldraøkinum.**

**Fyritreytin er eitt hugvekjandi øki, sum er grundað á álit, høgt fakligt støði og virðing.**

Kanningarúrslitini vístu m.a. heilt greitt, at eldri vilja búgva heima sum longst, ið er í samsvari við gransking á eldraøkinum og við eldralógina, sum ásetur, at kommunurnar skulu veita heimabúgvandi fólkapensjónistum tænastur, ið kunnu stimbra likamliga, sálarliga og sosialt, soleiðis at pensjónisturin kann búgva í egnum heimi sum longst.

Endamálið er at veita borgarum við tørvi á hjálp eina samskipaða heildartænastu.

Strategiin fyri framtíðarvirksemið hjá NBH varð í 2016 orðað út frá úrslitunum í kanningini, har dentur er lagdur á at styrkja tær tænasturnar, sum stuðla undir møguleikan fyri at búgva heima. Ein tilgongd, ið miðsavnar seg um heilsuframa, fyribyrging og rehabilitering.

Íverksetanin av strategiini er komin væl áleiðis, men enn standa stór tøk fyri framman. Serliga er tað at byggja nýggjar og hóskandi bústaðir til aldrandi ættarliðið.

## SKIPAN

Virksemið hjá NBH er í høvuðsheitum skipað eftir løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m., sum seinast varð broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021[3], vanliga umrødd sum eldralógin, og løgtingslóg nr. 20, eisini frá 7. apríl 2014, kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt[4] v.m. Endamálið í eldralógini er at veita borgarum við tørvi á hjálp eina samskipaða heildartænastu og er lýst soleiðis í §1:

Stk. 2. Endamálið við heildartænastuni er:

*a) at fyribyrgja sjúku,*
*b) at stimbra sálarligu og likamligu heilsu og trivnað borgarans,*
*c) at endurmenna mistan førleika,*
*d) at stimbra møguleika hins einstaka at klára seg sjálvan,*
*e) at veita røkt og umsorgan.*

Stk. 3. *Hjálpin skal taka atlit til tørv, trivnað, fortreytir og sjálvsavgerðarrætt borgarans og skal í størst møguligan mun verða veitt í samráð og í samstarvi við hin einstaka og í øðrum lagi við tey avvarðandi, við samtykki frá tí einstaka.*

Stýrið fyri NBH er mannað við borgarstjórunum í kommunala samstarvinum í Norðoyggjum umframt seks býráðslimum í Klaksvíkar kommunu. Sostatt eru 11 limir í stýrinum.

Sambært løgtingslóg nr. 20, frá 2014 skipar stýrið seg sjálvt, *men ein av borgarstjórunum í samstarvinum skal vera formaður* (§7, stk. 4).

Frá 2015 til 2020 var Jógvan Skorheim, borgarstjóri í Klaksvíkar kommunu, stýrisformaður og Hans Jákup Kallsberg, borgarstjóri í Viðareiðis kommunu, næstformaður.

Frá 2021 til 2024 var Karl H. Johansen, borgarstjóri í Klaksvíkar kommunu, stýrisformaður og Katrin Næs, borgarstjóri í Hvannasunds kommunu, næstformaður.

Marna Ellingsgaard Jensen hevur verið stjóri í NBH øll árini.

Nærri kunning um umsiting og bygnað sæst á heimasíðuni hjá NBH, www.nbh.fo

3 *https://logir.fo/Logtingslog/19-fra-07-04-2014-um-heimataenastu-eldrarokt-vm*
4 *https://logir.fo/Logtingslog/20-fra-07-04-2014-um-kommunalt-samstarv-um-heimataenastu-eldrarokt-vm*

## ELDRARÁÐIÐ

Sambært §6, stk 2, í eldralógini kunnu kommunurnar *seta á stovn eldraráð í økinum, sum verða tikin við upp á ráð, tá avgerðir og umskipanir innan økið skulu fremjast*. Í sambandi við kommunalu yvirtøkuna av eldraøkinum varð Eldraráðið í Klaksvík á kommunuvalinum í 2016 umskipað til eitt felags eldraráð fyri allar Norðoyggjar, svarandi til tað økið, sum NBH fevnir um og varðar av.

Endamálið hjá Eldraráðnum[5] er at vera ráðgevi hjá NBH og at betra og útbyggja sambandið millum eldri borgarar í Norðoyggjum og NBH. Viðtøkurnar fyri Eldraráðið síggjast á heimasíðuni hjá NBH[6].

Árliga eru í minsta lagi fýra fundir millum NBH og Eldraráðið í Norðoyggjum. Samstarvið millum NBH og Eldraráðið hevur verið og er framvegis av stórum týdningi fyri menningina av tænastunum og skipanum í NBH. Nevnast kann, at Eldraráðið hevur ein fastan lim í bygginevndini hjá NBH og hevur m.a. arbeitt fyri, at neyðstreymsaggregat eru komin á Sambýlið á Heygnum og Heimið við Vágna.

## STARVSFÓLK

Í desember 2023 starvaðust umleið 275 starvsfólk hjá NBH, og telja tey stívliga 185 ársverk. Á mynd 1 sæst býtið millum fakbólkarnar og ársverkini í desember 2015, 2019 og 2023. Bæði tal av starvsfólkum og ársverkum er munandi vaksið hesi árini, og er tað ein endurspegling av víðkaða virkseminum hjá NBH og munandi øktu fíggjarligu avsetingini, sí partin um fígging.

Størsti vøksturin sæst hjá røktarstarvsfólkum uttan heilsufakliga útbúgving. Eitt av virðunum hjá NBH er høgt fakligt støði, og tí verður støðugt arbeitt í NBH við framhaldandi at skipa góðar karmar fyri fakligari menning og eggja starvsfólkum at taka av teimum møguleikunum, ið finnast til at menna seg innan yrkið.

At tað eru færri starvsfólk í Ven og Virka kemst av, at tað ikki hevur verið møguligt at manna normeraðu størvini í eindini, ið eru munandi økt, sí brotið um Ven og Virka.

### 1. STARVSFÓLK Í NBH - DESEMBER 2015, 2019 OG 2023




5 https://nbh.fo/um-okkum/eldraradid/
6 https://nbh.fo/wp-content/uploads/2020/09/vidtoekur-fyri-eldraradid-i-nordoyggjum-2021-2024.pdf

## BORGARAR

Tað finnast ikki neyv hagtøl fyri, hvussu nógvir borgarar í Norðoyggjum fáa einhvørja tænastuveiting, men mett verður, at tað liggur um 700 borgarar. Um ikki-visiterað tilboð, so sum eginvenjing í Ven og Virka, opna dagtilboðið og fyribyrgjandi heimavitjanir, verða tald við, er talan um á leið 800 til 900 borgarar í Norðoyggjum, sum onkursvegna hava samband við NBH.






# TÆNASTUR

Allar áheitanir um tænastur frá NBH skulu sambært eldralógini §3, stk. 1, viðgerast við støði í eini fakligari meting.
Tænastur og tilboð hjá NBH fevna um:

- → **Heimatænastu**
  - Heimahjálp
  - Heimasjúkrarøkt
- → **Fysio- og ergoterapi**
- → **Eginvenjing**
- → **Samdøgursrehabilitering**
- → **Mattænastu**
- → **Stuðul til reingerð**
- → **Fyribyrgjandi heimavitjanir**
- → **Dagtilhald**
  - Búðatrøð, sum er ætlað fólkapensjónistum við demenssjúku
  - Sóljan, opið dagtilhald fyri fólkapensjónistar í Norðoyggjum
  - Dagtilhaldið á Viðareiði, bæði opið og visiterað
- → **Virkishúsið Smæran**
- → **Sjálvboðið arbeiði í samstarvi við Eldraráðið og Reyða Kross**
- → **Umlætting**
- → **Ansing**
- → **Búpláss**

## HEIMATÆNASTAN

Sambært løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. skulu kommunurnar veita heimabúgvandi borgarum heimatænastu eftir tørvi, §9.

*Stk. 2. Heimatænastan er tænasta, sum fevnir um:*
*1) Heimahjálp. 2) Heimasjúkrarøkt.*
*Stk. 3. Heimahjálp verður veitt borgarum, sum hava tørv á persónligari hjálp, røkt ella stuðli.*
*Stk. 4. Heimasjúkrarøkt fevnir um sjúkufyribyrging, sjúkrarøkt, endurmenning, uppsøkjandi arbeiði og almenna heilsuvegleiðing.*

Játtanin til virksemið í Heimatænastuni er munandi økt síðani 2015 í samsvari við íverksetanina av framtíðarstrategiini fyri NBH. Nevnast kann uppnormering av vaktunum til átta tímar, arbeiðsbilar og sjúkrarøktarfrøðingar í vakjandi náttarvakt, sum hevur við sær, at Heimatænastan nú kann veita sjúkrarøkt eftir tørvi alt samdøgrið til bæði heimabúgvandi borgarar og búeindirnar.

Hagtøl frá Heimatænastuni vísa, at tørvurin á sjúkrarøkt um náttina er nógv øktur, sí mynd 2.

Tað er altíð ávíst sveiggj í talinum av borgarum, ið antin fáa heimahjálp, sjúkrarøkt ella bæði. Ein tværskurður frá desember 2023 vísir, at umleið 160 heimabúgvandi borgarar vóru knýttir at Heimatænastuni. Tænastan verður í høvuðsheitum veitt borgarum, sum eru 67 ár og eldri, sí mynd 3, 4 og 5.



### 2. VITJANIR HJÁ SJÚKRARØKTARFRØÐINGUM Í NÁTTARVAKT




### 3. TAL AV BORGARUM, IÐ FÁA VEITINGAR FRÁ HEIMATÆNASTUNI DES. 2023



## 4. HEIMASJÚKRARØKT, BÝTT Á KYN OG ALDUR, DES. 2023




## 5. HEIMAHJÁLP, BÝTT Á KYN OG ALDUR, DES. 2023






## 6. BORGARAR, IÐ FÁA VEITINGAR Í HEIMATÆNASTUNI, 2017-2023, EIN TVØRSKURÐUR




| | 2017 | 2019 | 2020 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|
| Sjfr. | 211 | 107 | 106 | 123 | 126 |
| Heimahj. | 100 | 72 | 77 | 66 | 84 |
| Sjfr. | 211 | 107 | 106 | 123 | 126 |
| Sjfr. | 211 | 107 | 106 | 123 | 126 |
| Sjfr. | 211 | 107 | 106 | 123 | 126 |
| Sjfr. | 211 | 107 | 106 | 123 | 126 |

Mynd 6 vísir ein tvørskurð av gongdini í Heimatænastuni. Tølini eru tald í januar, árini 2017 til 2023. Samlaða talið av borgarum, ið fáa tænastu, er lækkað úr 259 til 132 í 2019, og sæst serliga aftur hjá sjúkrarøktarfrøðingum. Orsøkin er helst tann, at ambulatoriið hjá sjúkrarøktarfrøðingum, har borgarar kundu venda sær uttan ávísing, varð niðurlagt í hesum tíðarskeiðnum. Tað komst av, at Heimatænastan flutti úr leigaðum hølum hjá KBI út á Stoksoyrarveg og síðani í núverandi hølir í Bøgøtu 32. Nýtt ambulatorium í núverandi hølum, sum er ogn hjá NBH, verður helst klárt í 2025, har henda tænastuveitingin kann setast inn aftur. Síðani 2019 sæst tó ein støðugur vøkstur í talinum av borgarum, knýttir at Heimatænastuni.

Tænasturnar, ið heimahjálparabólkurin veitir, verða skrásettar í KT-skipanini “3V”, sum í høvuðsheitum er ein faktureringsskipan, haðani tað eisini ber til at fáa hagtøl. Á mynd 7, har tøl frá 2024 eru tikin við, sæst tal av veitingum, borgarum og tal av veittum tímum fyri hvønn borgara síðani 2015.

Fram til 2019 sæst ein minking í veittum tænastum. Tað er ilt at siga, hvør orsøkin er, men NBH hevur lagt dent á at menna heilsufremjandi og fyribyrgjandi tænastur, so sum fyribyrgjandi heimavitjanir, víðkaðar upplatingartíðir í dagtilhaldum, skipaða venjing og tilboð um eginvenjing, rehabilitering, mattænastu allar dagar í árinum, sjúkrarøkt alt samdøgrið til heimabúgvandi borgarar o.s.fr. Í 2020 og 2021 sæst ein vøkstur í veittum tænastum. Serliga stórur er vøksturin viðvíkjandi, hvussu nógv tíð í miðal er brúkt hjá hvørjum borgara. Ein orsøk er helst koronufarsóttin, sum hevði við sær, at umrøddu tænastur í longri tíðarskeið vórðu niðurlagaðar.

Umbønir um tænastur, sum heimahjálparabólkurin veitir, er støðugt vaksandi, og vísir tað seg í øllum trimum tættum í mynd 7. Veittir heimahjálparatímar eru vaksnir við 4.539 tímum síðani 2015, sí mynd 8.



## 7. HEIMAHJÁLP - VEITINGAR, BRÚKARAR OG TÍÐ




| | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal av veitingum | 38.356 | 40.502 | 38.849 | 38.356 | 34.016 | 41.725 | 43.687 | 39.412 | 42.912 | 44.647 |
| Tal av brúkarum | 106 | 122 | 139 | 110 | 110 | 103 | 111 | 103 | 117 | 121 |
| Tímar/brúkara | 135.2 | 124.1 | 103.1 | 126.8 | 118.1 | 162.5 | 155.5 | 150.8 | 150.8 | 159.3 |

## 8. TAL AV VEITTUM HEIMAHJÁLPARATÍMUM



## VEN OG VIRKA, FYSIO- OG ERGOTERAPIEINDIN

Endamálið, sambært eldralógini, er at veita tænastur, sum stuðla undir, at borgarin kann búgva heima sum longst:

*§10. Kommunurnar veita heimabúgvandi fólkapensjónisti tænastur, ið kunnu stimbra viðkomandi likamliga, sálarliga og sosialt, soleiðis at hann kann búgva í egnum heimi sum longst.*
*Stk. 2. Tænasturnar kunnu fevna um dagtilhald, dagtilboð,* ***ergoterapi, fysioterapi, fyribyrgjandi venjing****, mattænastu, umlætting, koyritænastu, vegleiðing o.s.fr.*

*§10 a. Kommunurnar veita* ***endurvenjing*** *til heimabúgvandi fólkapensjónist, ið vegna mistan førleika hevur tørv á endurvenjing. Endurvenjing verður veitt við tí endamáli, at fólkapensjónisturin:*
*1) kann búgva heima sum longst og*
*2) kann klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá kommununi.*

*§10 b. Kommunurnar veita* ***viðlíkahaldsvenjin****g til heimabúgvandi fólkapensjónist, ið vegna ellisbrek ella sjúku hevur týðandi og varandi skert virkisføri, ið hevur týðandi ávirkan á, hvussu sjálvhjálpin fólkapensjónisturin er.*
*Stk. 2. Viðlíkahaldsvenjing verður veitt við tí endamáli at tryggja verandi virkisførleika og fyribyrgja og útseta, at virkisførleikin versnar, soleiðis at fólkapensjónisturin:*
*1) kann búgva heima sum longst, og*
*2) kann klára seg uttan hjálp ella við minni hjálp frá kommununi.*





Endamálsorðingin hjá Ven og Virka er soljóðandi:

- → Stuðla undir at borgarin varðveitir, mennir ella endurvinnur virkisførleikan, soleiðis at hann er so sjálvbjargin sum gjørligt og kann liva eitt so virkið, sjálvstøðugt og innihaldsríkt lív sum gjørligt.
- → Stuðla undir, at borgarin kann búleikast heima sum longst og kann luttaka í samfelagnum á jøvnum føti við aðrar samfelagsborgarar.
- → Stuðla undir góða heilsustøðu hjá borgaranum og vera við til at fyribyrgja førleikamissi.
- → Stuðla undir heilsugóð ellisár.

Arbeiðið hjá terapeutunum fer fram í venjingarhølunum, heima hjá borgarum og á búeindunum. Ergoterapeutarnir luttaka somuleiðis í visitatiónini til tænasturnar hjá NBH, tá ið visitator metir, at tørvur er á tí.

Virksemið í Ven og Virka er nógv vaksið, síðani eldraøkið var lagt út til kommunurnar at umsita. Í dag eru fleiri enn 500 borgarar í Norðoyggjum skrásettir hjá Ven og Virka. Nýggj tilboð og nýggjar tænastur, so sum eginvenjing, samdøgurs-rehabilitering, viðlíkahalds- og endurvenjing, eru settar í verk og víðkaðar hesi árini, sí mynd 9.

## 9. VIRKSEMIÐ, TAL AV TÆNASTUM




| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Skipað venjing | 1.297 | 107 | 106 | 123 | 126 |
| Eginvenjing | 6.699 | 72 | 77 | 66 | 84 |
| Samdøgurs rehabilitering | 273 | 107 | 106 | 123 | 126 |
| Búeindir | 179 | 107 | 106 | 123 | 126 |
| Heimavitjanir | 440 | 107 | 106 | 123 | 126 |
| Tilsamans | 4.888 | 107 | 106 | 123 | 126 |



Á vári 2021 samtykti stýrið at keypa venjingarútgerð til hølir í skúlanum á Viðareiði. Tey eru nú sett upp, og NBH fegnast um, at tað ber til at bjóða borgarum norðan fyri Fjall sama venjingartilboð sum í Klaksvík.

Henda gongdin hevur eyðvitað kravt størri starvsfólkaorku í Ven og Virka, har tað í dag er normering til fýra fysioterapeut-størv (starvsbrot 4,0), fýra ergoterapeutstørv (starvsbrot 3,2) og eitt heilsurøktarastarv (starvsbrot 0,9) (her eru deildar-leiðari, sum er fysioterapeutur, og leiðandi ergoterapeutur taldir við), mótvegis tveimum fysioterapeutum og tveimum ergoterapeutum í 2015 á tilsamans starvsbrot 2,6.

Hóast Ven og Virka er tann eindin í NBH, sum hevur nógv størsta vøksturin í fíggjarligari avseting, næstan 300% mótvegis góðum 150% til restina av NBH, eru bíðilistarnir til tænastur frá Ven og Virka framvegis langir. Hetta kemur partvíst av, at tað hevur verið trupult at manna størvini.

Ynskiligt er tó eisini at víðka virksemið enn meiri í Ven og Virka, har tænasturnar í høvuðsheitum hava eina heilsufremjandi, fyribyrgjandi og/ella rehabiliterandi tilgongd í samsvari við strategiina hjá NBH um at styrkja tær tænastur, sum eldri fólk ynskja sær, og sum kunnu stuðla undir bæði likamligan, sálarligan og sosialan virkisførleika og harvið økja um møguleikan fyri, at eldri í Norðoyggjum kunnu búgva heima sum longst. Í 2023 komu íalt 377 áheitanir til Ven og Virka um venjing, hjálpartól, vegleiðing í flytingum, heimavitjanir og visitatiónir.

Starvsfólk hjá NBH hava møguleika at venja ókeypis í Ven og Virka sum ein liður í starvsfólkarøkt og fyri at stuðla undir góða heilsustøðu hjá starvsfólkunum.

Ven og Virka í Klaksvík er somuleiðis karmur um venjing hjá borgarum 60 ár og eldri, hvørs kvøldskúlatilboð Klaksvíkar Kvøld-, ungdóms- og listaskúli (KKS) skipar fyri.

Koronufarsóttin hevði stóra ávirkan á virksemið í Ven og Virka. Serliga skipaða venjingin, eginvenjingin og samdøgursrehabiliteringin vórðu niðurlagaðar. Starvsfólkini í Ven og Virka sóu týðiliga afturgongd í førleikastøðinum hjá borgarunum undir farsóttini. Hóast farsóttin eisini herjaði í 2021, bar til hjá starvsfólkunum í Ven og Virka at skipa virksemið undir tryggum kørmum, soleiðis at tænastan vaks í mun til 2019, sí mynd 10, sum eisini lýsir, hvussu virksemið í Ven og Virka annars støðugt er vaksið øll árini.

## 10. SAMDØGURÐSREHABILITERING, SKIPAÐ VENJING OG EGINVENJING




## EGINVENJING

NBH bjóðar tveir dagar um vikuna fólkapensjónistum í Norðoyggjum eginvenjing í Ven og Virka, bæði í Klaksvík og á Viðareiði, har borgarar kunnu venja í venjingarhølunum ókeypis. Tilboðið er uttan vegleiðing frá starvsfólkunum, men nýggir luttakarar fáa vegleiðing frá terapeutunum í at nýta venjingartól og aðra ráðgeving.

Sum heild eru hetta borgarar, ið eru sjálvhjálpnir, men tað eru nógv dømi um eldri borgarar, ið hava fingið skipaða venjing, sum síðani halda fram í eginvenjingini. Talið av teimum, sum koma til eginvenjing, er støðugt vaksandi, og tølini frá 2023 vísa, at uml. 130 borgarar gagnnýta tilboðið.

## SAMDØGURSREHABILITERING

Samdøgurðsrehabilitering er tilboð, sum NBH bjóðar heimabúgvandi fólkapensjónistum í Norðoyggjum, ið hava fingið afturgongd í førleikastøðuni og hava ynski um og tørv á at endurvinna mistar førleikar og at megna gerandisdagin á best møguligan hátt.

Yvirskipaða endamálið er, at fólkapensjonisturin megnar sín gerandisdag, í tann mun tað ber til, og fær møguleika fyri at búgva heima sum longst.

Samdøgursrehabiliteringin, sum byrjaði við tveimum plássum í 2018, er staðsett á Sambýlinum á Heygnum og er skipað við einum tvørfakligum toymi. Í toyminum eru ergoterapeutar, fysioterapeutar, sjúkrarøktarfrøðingur og heilsurøktarar. Heilsustarvsfólk á sambýlinum eru somuleiðis virkin í rehabiliteringstilgongdini allan sólarkringin. Tilboðið er

tíðaravmarkað, og málið fyri rehabiliteringini tekur støði í ynskjum og tørvum hins einstaka í samsvari við nýggju allýsingina av rehabilitering í "Hvidbogen"[7] .

Tørvurin á samdøgursrehabilitering er stórur, og bíðilisti er til hetta tilboðið, sum so líðandi er økt og telur nú fimm pláss á Sambýlinum á Heygnum.

## MATTÆNASTA

Talið av borgarum í Norðoyggjum, sum fáa døgurða bornan heim, er tvífaldað úr umleið 40 til 80. Í 2015 var tað einans møguligt at fáa heitan mat gerandisdagar, men nú kunnu borgarar fáa mat allar dagar í árinum, av tí at maturin nú verður borin út kaldur. Borgarin kann síðani hita matin sjálvur ella fáa hjálp til hetta frá starvsfólkum í Heimatænastuni. Mattænastan er ein týðandi, fyribyrgjandi tænasta, ið stuðlar undir at kunna búgva heima sum longst. Maturin verður framleiddur í køkinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, meðan NBH skipar flutningin. Tænastan verður veitt mótvegis gjaldi.

## FYRIBYRGJANDI HEIMAVITJANIR

Eldralógin áleggur kommunum at bjóða øllum, sum eru 75 ár og eldri, eina fyribyrgjandi heimavitjan.

*§11. Kommunurnar skulu bjóða øllum borgarum, sum eru vorðnir 75 ár, fyribyrgjandi heimavitjan. Stk. 2. Heimavitjanirnar verða lagdar til rættis eftir tørvinum í økinum. Í minsta lagi skulu kommunurnar bjóða eina fyribyrgjandi heimavitjan um árið.*

7 *https://www.rehabiliteringsforum.dk/siteassets/publikationer/publikationerlitteratur/hvidbog-2-udgave_180522-til-web.pdf*



*Stk. 3. Kommunurnar kunnu víkja frá stk. 1 og 2, um talan er um borgara, sum fær aðra tænastu sambært hesi lóg.*

Í samsvari við lógina bjóðar NBH øllum borgarum, sum eru 75 ár og eldri og ikki longu fáa tænastur frá NBH, eina árliga fyribyrgjandi heimavitjan, har heilsuráðgevin í NBH kemur á gátt. Endamálið við tænastuni er at stimbra heilsu og trivnað, at byrgja fyri sjúku, at stimbra evnini at vera virkin og at kunna um heilsufremjandi tilboð, ið kunnu stuðla undir at búgva heima sum longst.

Heilsuráðgevin vísir borgarum á tilboð hjá NBH og kommununum, ið kunnu stimbra undir heilsu og ein virknan gerandisdag. Eisini vísir hann beinleiðis til aðrar tænastur hjá NBH og til kommunulækna, um tørvur er á tí.

Hóast talið av eldri er vaksið, og fleiri hava fingið bjóðað fyribyrgjandi heimavitjan í hesum tíðarskeiðnum, so er talið og prosentbýtið av teimum, sum taka av vitjanini, munandi minkað mótvegis teimum, ið ikki vilja hava vitjan, sí mynd 11 og 12.

Tað er ilt er at meta um, hví gongdin er hendan, og hvørt tað ávirkar dygdina í tænastuni. Ein broyting í tilgongdini er tann, at heilsuráðgevin ringir til allar borgarar, sum í brævi hava fingið tilboð um vitjan, eina mest tí at hann ofta kom á læstar dyr. Vinningurin í at ringja er, at tað fæst ein ábending um, hvussu eldri fólk sum heild eru fyri, og heilsuráðgevin í NBH metir, at teir borgarar, sum ikki taka av, í høvuðsheitum eru sera virknir og heilsuliga væl fyri, og at fleiri teirra framvegis eru knýttir at arbeiðs-marknaðinum. Somuleiðis verður mett, at nógv eldri í Norðoyggjum eru vorðin kunnug við tilboð og tænastur hjá NBH og í kommununum annars, síðani tær fyribyrgjandi heimavitjanirnar byrjaðu.

## 11. TAL AV BORGARUM




## 12. BÝTIÐ MILLUM TEY, SUM YNSKJA OG IKKI YNSKJA VITJAN




Hinvegin vísa hagtølini, at av teimum, sum taka av fyribyrgjandi heimavitjanum, verða lutfalsliga nógv víst til aðrar tænastur/tilboð, bæði í og uttan fyri NBH, og lutfallið er vaksandi. Við nýggju tilgongdini, sum er lýst í mynd 13, ber kanska til at siga, at tænastan er tillagað, so hon rakar tann bólkin av eldri, sum hava størstan tørv á tænastum, heldur enn tey, sum hava tørv á samrøðu/vitjan um heilsuframa og fyribyrging. Ein orsøk til gongdina í tænastuni kann vera, at tað er munandi minni starvsfólkaorka sett av til fyribyrgjandi heimavitjanir í NBH samanborið við onnur øki í Føroyum.

## 13. %-BÝTIÐ MILLU SJÁLVHJÁLPIN OG VÍST TIL TÆNASTUR



## 14. FYRIBYRGJANDI HEIMAVITJANIR, 2023




## 15. MIÐALALDUR




## 16. %PARTURIN AV 75+ ÁR, IÐ FÆR TILBOÐ UM HEIMAVITJAN




Ven og Virka fær nógv flestu ávísingarnar, sum verða gjørdar í sambandi við fyribyrgjandi heimavitjanir, sí mynd 14. Ávísingarnar til Ven og Virka eru vaksnar úr 60% í 2018 til 74% í 2023.

Miðalaldurin á teimum, sum taka av vitjan og ikki, sæst á mynd 15. Tey, sum taka av, eru í miðal nakað eldri enn tey, ið ikki ynskja vitjan.

%-parturin av teimum, ið eru 75 ár ella eldri og fáa bjóðað fyribyrgjandi heimavitjan, vaks við sløkum 10 prosentstigum, men minkaði aftur við uml. 6 prosentstigum í 2022, sí mynd 16. Fyribyrgjandi heimavitjanir í NBH eru einans ætlaðar teimum, sum ikki fáa aðrar tænastur frá NBH, og tí kann sigast, at hesin bólkurin av eldri er vorðin sjálvbjargnari í tíðarskeiðnum 2020 til 2021, men síðstu árini líkjast meiri teimum í 2019.

## 17. KYNSBÝTIÐ - VITJAN OG EI VITJAN



Um hugt verður eftir tølum frá 2022 og 2023 sæst, at munurin millum kynini er lítil og eingin hjá teimum, sum taka av fyribyrgjandi heimavitjan og ikki. Tað eru tó lutfalsliga eitt sindur fleiri kvinnur, ið taka av tilboðnum, sí mynd 17.

## STUÐUL TIL REINGERÐ

Vitandi um, at fleiri borgarar aftra seg við at keypa sær reingerðartænastu orsakað av gjaldinum, tey mugu rinda, samtykti stýrið í 2017 at fara undir eina royndarverkætlan, har fíggjarligur stuðul varð veittur til reingerð til í mesta lagi 30 fólkapensjónistar. Borgarin rindaði tá 200 kr. heldur enn 300 kr., sum var ásetti prísurin hjá reingerðarfyritøkunum. Stuðulin er nú fastur partur av tænastuveitingunum hjá NBH og er eisini hækkaður, soleiðis at brúkborgarin rindar 125 kr. fyri hvønn reingerðartíma. Pláss er nú fyri 40 heimabúgvandi fólkapensjónistum í skipanini. Treytin fyri at fáa stuðul er, at pensjónisturin hevur ein mettan tørv á stuðli til reingerð og eina inntøku svarandi til vanliga fólkapensjón og samhaldsfasta. Stuðul verður veittur til reingerð ein tíma um vikuna ella tveir tímar 14. hvønn dag.



## DAGTILHALD

Í NBH eru trý dagtilhald, Dagtilhaldið Búðatrøð, Dagtilhaldið Sóljan og Dagtilhaldið á Viðareiði.

### DAGTILHALDIÐ BÚÐATRØÐ

Búðatrøð er dagtilhald fyri borgarar, heimabúgvandi í Norðoyggjum, sum hava fingið staðfest demenssjúku. Tey húsast í norðara enda á fyrstu hædd á Heiminum við Vágna. Starvsfólkini hava servitan og drúgvar royndir á demensøkinum. Umleið 20 borgarar hava tilknýti til Búðatrøð.

Endamálið hjá Búðatrøð er:

- → *Við rættari viðgerð og hjálp at stuðla undir ein skipaðan, innihaldsríkan gerandisdag, ið er merktur av lívsgleði og trivnað hóast sjúku.*
- → *Við vegleiðing, ráðgeving og undirvísing stuðla familjunum, so tær gerast førar fyri at veita tann stuðul og ta hjálp, ið krevst at vera um ein avvarðandi, sum hevur fingið demenssjúku.*
- → *At stuðla undir sjálvsavgerðarrættin við støði í førleikum hins einstaka.*
- → *At gera tað møguligt hjá menniskjum við demensi at búgva heima sum longst.*

Umframt dagtilhald veita starvsfólkini á Búðatrøð eisini avvarðandi og øðrum áhugaðum vegleiðing, ráðgeving og undirvísing í demensspurningum.

Búðatrøð arbeiðir í tøttum samstarvi við Heimatænastuna og demensklinikkina á Landssjúkrahúsinum.

Hagtøl hjá Búðatrøð vísa, at hetta tilboðið útsetir tørvin á búplássi millum tvey og fýra ár.

Virksemið í Búðatrøð er víðkað, og Búðatrøð er nú opið allar gerandisdagar, bæði um dagin og nøkur kvøld um vikuna. Tørvurin á dagumlætting er støðugt vaksandi, sum mynd 18 vísir. Orsakað av koronu minkaði virksemið nakað í 2020.

## DAGTILHALDIÐ SÓLJAN

Dagtilhaldið Sóljan er opið dagtilhald, ætlað fólkapensjónistum í Norðoyggjum. Dagtilhaldið hevur hildið til á Heiminum við Vágna síðan 2014, men flutti í februar 2020 inn í nýumvæld leiguhøli á Stoksoyrarvegi 39, sum eru innrættað til virksemið.

Endamálið við Dagtilhaldinum er, at øll skulu kenna seg vælkomin í dagtilhaldinum til hugnaliga samveru í hugnaligum umhvørvi, har dentur verður lagdur á heilsu-mennandi og fyribyrgjandi virksemi, ið eggjar borgaranum at vera virkin í egnum lívi.

Størsti áhugin at vitja dagtilhaldið er hjá teimum eldru, sum hava fingið ávísar heilsuligar avbjóðingar.

Virksemið fer fram bæði inni í dagtilhaldinum (dansur, fimleikur, upplestur, sangur, handarbeiði, bingo o.s.fr.) og uttanfyri (útferðir, festivalar, veitslur, jólasøla o.s.fr.).

Starvsfólkini í dagtilhaldinum hava heilsufakligar útbúgvingar (sjúkrarøktarfrøðingur og heilsuhjálpari), og partur av starv-inum er eisini at gera heimavitjanir eftir áheitan frá visitator, avvarðandi ella øðrum.

Virksemið er støðugt vaksið, og í dag vitja millum 25 og 30 fólk



### 18. VITJANIR Á BÝÐARTRØÐ




### 19. DØGURÐAR Í SÓLJUNI



dagliga. Í mars 2023 varð virksemið víðkað, við at farið verður í Kalsoynna at hava dagtilhald ein dag um mánaðin.

At eta døgurða saman er tilboð, sum er víðkað til fýra dagar um vikuna. Opna tilboðið í Sóljuni hevur verið skipað í avmarkaðar og visiteraðar bólkar í koronutíðini, og virksemið varð munandi skert partar av 2020, sí mynd 19.

### DAGTILHALDIÐ Á VIÐAREIÐI

19. januar 2024 var móttøka í hølunum í kjallaranum í missiónshúsinum á Viðareiði, har dagtilhaldið heldur til.

Endamálið við dagtilhaldinum á Viðareiði  er, eins og í Búðatrøð og Sóljuni, at eggja borgarum at vera virknir í egnum lívi. Dentur verður lagdur á heilsumennandi og fyribyrgjandi virksemi í einum innihaldsríkum gerandisdegi, ið er merktur av lívsgleði og trivnað. Dagtilboðið er somuleiðis við til at gera tað møguligt hjá eldri borgarum at búleikast heima sum longst.

Virksemið í dagtilhaldinum er partvíst eitt visiterað tilboð til fólkapensjónistar, ið hava fingið staðfest demenssjúku, og partvíst eitt opið tilboð og verður skipað í tøttum samstarvi við tey, sum koma.

Harafturat ber til hjá familjum, ið eru um ein avvarðandi, sum hevur fingið demenssjúku, at fáa vegleiðing og ráðgeving, so tær gerast førar fyri at veita tann stuðul og ta hjálp, ið krevst at vera avvarðandi.



## SJÁLVBOÐIÐ ARBEIÐI

Eldraráðið skipar í samstarvi við NBH og Reyða Kross fyri sjálvbodnum arbeiði, har fólk vitja á bústovnum og heima hjá borgarum. Leikluturin hjá NBH er at geva fakliga ráðgeving, um neyðugt, fyri at gera tey sjálvbodnu út til uppgávuna.

## VIRKISHÚSIÐ SMÆRAN

Virkishúsið Smæran er eitt tilboð til allar borgarar í Norðoyggjum yvir 60 ár. Her eru ymisk virkistilboð, ið fremja heilsu, trivnað og møguleikar fyri at skapa netverk og vinabond. Tað stendur øllum frítt at koma við uppskotum ella at fyriskipa tiltøk; tó er tað eitt brúkararáð í Smæruni, sum samskipar tiltøkini. Reglugerðin fyri Smæruna kann lesast á heimasíðuni hjá NBH[8].

Tilboðini eru ikki privat og skulu vera óheft politiskt og átrúnaðarliga; tó kunnu búfólk á Sambýlinum á Heygnum, Sambýlinum í Bøgøtu, Norðoya Ellis- og Vistarheimi og Norðoya Røktarheimi leiga Smæruna til egnar føðingardagar og merkisdagar, eins og Smæran kann leigast út til felagsskapir, ið hava tilknýti til fólk yvir 60 ár.

Virksemið er brúkarastýrt, og Smæran er karmur um nógv ymiskt virksemi, so sum sosiala samveru við kaffi og hugnapráti aftan á eginvenjing í Ven og Virka, vikulig tiltøk fyri menn og kvinnur, pensjónistafelagið Hugna, tiltøk í sambandi við torradagar, fráferðarløta hjá Team Rynkeby, fyrilestrar, veitslur, hátíðarhald, fundir hjá Eldraráðnum, undirvísing fyri starvsfólkum hjá NBH, kvøldskúlavirksemið fyri 60+ og annað.

Sambært ársfrásagnum eru tað vanliga meiri enn 3.000 vitjanir í Smæruni árliga.

*8 https://nbh.fo/wp-content/uploads/2024/07/virkishusid-smaeran-reglugerd-nbh-2024-07-12.pdf*

## UMLÆTTING

Umlætting er týðandi tænasta, sum stuðlar undir, at borgarin kann verða heima sum longst, eins og tað lættir um hjá teimum, sum varða av. Møguleiki er fyri at bjóða umlætting í styttri ella longri tíð, eins og fleksibla umlætting, tá ið eitthvørt hóttafall kemur, sum ger, at tað er neyðugt at vera heimanífrá í eina tíð. Eisini ber til at fáa styttri umlættingar, um avvarðandi hava tørv á at fáa frí til eitthvørt.

Í 2017 varð umlættingareind við átta plássum skipað á Gulu eind á Heiminum við Vágna. Síðani er hendan eindin vorðin demenseind við tveimum umlættingarplássum. NBH er í eini tilgongd, har Sambýlið á Heygnum við tíðini verður umlættingar- og rehabiliteringseind burturav.

Talið á umlættingardøgum er munandi vaksið frá 2015 til 2016 og síðani aftur frá 2020 til 2022, sum helst skyldast, at fleiri hava verið í langtíðarumlætting, tí tey ikki høvdu møguleika fyri at fara heim aftur. Orsøkin kann møguliga vera, at fleiri eldri undir koronu upplivdu sosiala isolatión og lækkandi førleikastig. Hetta sæst eisini aftur í, at bíðilistin til fast búpláss vaks heilt fitt hesa tíðina. Meiri um tað í brotinum um búeindir.

Talið á umlættingardøgum lækkaði aftur í 2023, sí mynd 20, sum eisini vísir, hvussu nógvir borgarar hava verið til umlætting, og dagar í miðal fyri hvønn borgara frá 2015 til 2023.



## 20. UMLÆTTINGAR, BORGARAR, DAGAR Í MIÐAL OG TILSAMANS




| | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Borgarar, tils. | 103 | 133 | 133 | 174 | 158 | 146 | 199 | 187 | 170 |
| Dag./borg. í miðal | 23.4 | 31.1 | 31.7 | 21.6 | 26.8 | 27.4 | 26.2 | 30.9 | 28.9 |
| Dagar, tils. | 2.412 | 4.141 | 4.220 | 3.762 | 4.230 | 1.005 | 5.206 | 5.774 | 4.906 |

## ANSING

Kommunurnar kunnu velja at geva samsýning fyri ansing eftir teimum treytum, sum eru lýstar í §12 í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m. Ansingin verður umsitin eftir ásetingunum í kunngerð nr. 127 frá 17. desember 2014 um umsiting av samsýning fyri ansing av eldri og óhjálpnum persónum[9].

NBH hevur frá byrjan veitt samsýning fyri ansing og er tað eldraøkið í Føroyum, sum veitir lutfalsliga flest ansingarsamsýningar. Talið á ansarum er tó nógv minkað síðani 2022, sí mynd 21.

NBH kennir ikki orsøkina við vissu, men hugsast kann, at lága samsýningin á 10.789 kr. og treytirnar annars ikki eru lokkandi og mugu metast ótíðarhóskandi. Í frágreiðing frá 2021, sum ein arbeiðsbólkur skrivaði um eftirmeting av eldraøkinum[10], varð mælt politisku skipanini at taka støðu til, hvørt ansingarsamsýningin skuldi broytast, men ongar broytingar vórðu tó gjørdar í tí sambandi.

Í 2021 játtaði stýrið fyri NBH, at ein samsýning kundi nýtast til fleksibla ansing. Tað vil siga, at avvarðandi kunnu gera avtalu við onkran ansara, sum tey sjálvi finna, um at ansa teirra avvarðandi upp til 12 tímar mánaðarliga, soleiðis at tey kunnu fara av húsum til eitthvørt, tey hava fyri neyðini. Hetta verður í mestan mun nýtt av avvarðandi hjá borgarum við demensi.

9 *https://nbh.fo/wp-content/uploads/2017/04/kunnger-nr-127-2014-samsning-fyri-ansing.pdf*
10 *http://tilfar.lms.fo/logir/alit/2021.12%20Eftirmeting%20av%20eldra%C3%B8kinum.pdf*



## 21. TAL AV ANSINGARSAMSÝNINGUM




## 22. DØGNPLÁSS




| | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Búpláss | 87 | 87 | 79 | 77 | 75 | 72 | 71 | 70 | 69 |
| Umlætting | | | 8 | 8 | 8 | 8 | 8 | 8 | 8 |
| Samdøgurs-rehabilitering | | | | 2 | 3 | 4 | 5 | 5 | 5 |
| Tilsamans | 87 | 87 | 87 | 87 | 86 | 84 | 84 | 83 | 82 |

## BÚEINDIR

Eldrabúpláss er ætlað teimum borgarum, sum hava tørv á støðugari hjáveru og røkt. Treytirnar fyri búplássi eru ásettar í eldralógini:

*§14. Røktarheim og eldrasambýli eru bústaðir, ið hýsa fólkapensjónistum við ellisbreki ella varandi sjúku, og sum hava tørv á hjálp ella røkt alt samdøgrið.*

Lógin heimilar í serligum førum, at fólk yngri enn 67 ár kunnu fáa fast pláss á eldrabústovnum.

Í NBH eru seks búeindir, Sambýlið á Heygnum, Sambýlið í Bøgøtu, Norðoya Ellis- og Vistarheim, Heimið við Vágna, Uppistova og Niðristova.

Avgerð um búpláss verður tikin í upptøkunevndini, sum er mannað við stjóra, varastjóra, deildarleiðarum og visitator. Avgerðin er fakliga grundað, og nevndin skal tryggja, at borgarin við størsta tørvi á røkt ella hjálp alt samdøgrið fær fremstu raðfesting.

Í 2015 vóru 87 búpláss. Síðani eru fimm pláss, orsakað av trongum umstøðum, niðurløgd. Tvey í Sambýlinum í Bøgøtu, tvey á Norðoya Ellis- og Vistarheimi og eitt á Sambýlinum á Heygnum. Sostatt eru í 2024 82 samdøgurpláss, ið fevna um 70 búpláss, 7 umlættingarpláss og 5 pláss til samdøgurs-rehabilitering, sí mynd 22.

Hóast talið av búplássum er lækkað, er miðalbútíðin lítið og einki broytt. Bútíðin er sløk 3,5 ár í miðal. Hetta er væl hægri enn á donskum røktarheimum, har bútíðin er 2,5 ár í miðal[11].

11 https://www.aeldresagen.dk/maerkesager-og-resultater/maerkesager/plejehjem/fakta/beboere-paa-plejehjem



### 23. BÚPLÁSS OG BÚTÍÐ, 2023




| | Menn | Kvinnur | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Tal | 23 | 60 | 83 |
| Bútíð | 4,3 | 2,4 | 3,4 |

### 24. MIÐALALDUR VIÐ INNFLYTING, 2023



Í 2023 er hugt eftir kynsmuninum í sambandi við bútíð og aldur við innflyting, sí mynd 23 og 24. Samanborið við donsk tøl, er miðalaldurin nakað hægri í Føroyum við innflyting – 83 ár mótvegis 81,4 árum í Danmark.

Munurin á bútíðini hjá monnum og kvinnum er rættiliga stórur í NBH.  Í 2023 var bútíðin hjá monnum 4,3 ár og hjá kvinnunum einans 2,4 ár í miðal. Í Danmark er støðan øvugt, har búgva kvinnurnar sløk 3 ár í miðal, meðan menninir búgva 2,3 ár í miðal á røktarheimi.

Eins og í Danmark er býtið millum menn og kvinnur, sum búgva á búeindunum í NBH tann, at tað eru 65% kvinnur og 35% menn, tá hugt verður eftir tølum frá 2015 til og við 2023[11].

Mynd 25 vísir, at árliga talið á teimum, sum fáa búpláss, er rættiliga støðugt, hóast talið av búplássum er lækkað síðan 2015. Heimið við Vágna læt upp í 2013, og tað er orsøkin til stóra talið tá. Ábendingar eru um, at talið verður nakað hægri í 2024.

Á búeindunum verður dentur lagdur á trivnað og at nøkta tørvin hjá tí einstaka. Saman við búfólkunum vilja vit skapa eitt trygt og livandi umhvørvi, ið byggir á álit millum búfólk og starvsfólk. Andin í heiminum skal vera merktur av virðing fyri tí einstaka búfólkinum. Búfólkini skulu hava umstøður at ráða yvir degi og lívi sínum, tó við fyriliti fyri lívihátti hjá hinum búfólkunum.

At búgva heima er í samsvari við ynskini hjá teimum eldru og verður mett at hava stóran týdning fyri trivnað, lívsgóðsku og heilsu hjá eldri fólki. Ætlanirnar hjá kommununum um at byggja eldravinaligar íbúðir kunnu eisini hugsast at fara at minka



## 25. FINGIÐ BÚPLÁSS




## 26. BRÁFEINGISBÍÐILISTI TIL BÚPLÁSS, MIÐALTØL





um tørvin á røktarheimsplássum, ið er tann kostnaðarmiklasta tænastan at reka.

Sum longu lýst, so hevur koronufarsóttin ávirkað mest sum alt virksemið hjá NBH, og avleiðingarnar hava verið isolatión í egnum heimi og á búeindunum, eins og afturgongd í førleikastigi. Hetta sæst týðiliga aftur í bráðfeingis bíðilistanum til búplass, sí mynd 26.

Sum møguligt úrslit av strategiini, ið miðsavnar seg um heilsuframa, fyribyrging og rehabilitering, sást, at bráðfeingis-bíðilistin minkaði eyðsýnliga fram til 2020 og vaks so aftur, og í februar 2021 vóru tað í miðal 15 borgarar, ið høvdu bráðfeingis tørv á búplássi. Bíðilistin er minkaður eitt vet, og ábendingar eru um, at minkingin er nakað størri í 2024.



# DEMENSÆTLAN

Maria Skaalum Petersen, PhD og leiðari á Heilsugranskingar-eindini í Sjúkrahúsverkinum, kannaði í 2018 títtleikan av demensi á eldrabýlunum í Føroyum[12]. Kanningin vísti, at NBH var einasta eldraøki, ið ikki hevði eina demenseind burturav. Mett varð neyðugt at betra bæði fysiskar karmar og starvs-fólkaførleikar fyri at kunna møta tørvinum á vaksandi talinum á eldri borgarum við demenssjúkum. Farið varð tí undir at orða og seta í verk eina staðbundna demensætlan fyri NBH við støði í demensætlanini fyri Føroyar[13] og kanningini hjá Mariu Skaalum Petersen.

Fígging var avsett til íverksetan í eitt fimmáraskeið. Byrjað varð við at umskipa Sambýlið í Bøgøtu til eitt demensheim, har øll starvsfólk fingu skipaða undirvísing um demens. Síðani vórðu upplatingartíðirnar í Búðatrøð víðkaðar til at umfata tilboð um dagin og kvøldið, eins og møguligt er at hava opið um vi-kuskiftið. Í 2020 tóku 10 starvsfólk eina longri útbúgving sum demenssamkiparar. Farið er undir at umskipa Gulu eind á Heiminum við Vágna, sum hevur verið umlættingareind, til demen-seind. Seks kømur verða føst búpláss, meðan tvey skulu nýtast sum umlættingarpláss. Endaliga íverksetanin er treytað av, at tað so líðandi verða fleiri umlættingarpláss á Sambýlinum á Heygnum, sum skal skipast sum umlættingar- og rehabili-teringseind burturav.

Ætlanin er at uppraðfesta demenstænasturnar til borgarar, sum eru heimabúgvandi og komnir stutt í sjúkugongdini (pakki 1). Royndir úr m.a. Roðanum, sum er kommunala samstarvið á Skálafjørðinum, hava víst, at hetta styrkir

12 *http://www.alzheimer.fo/wp-content/uploads/2018/09/Ti%CC%81ttleikin-av-demensi_final.pdf*
13 *http://cdn.lms.fo/media/6374/demens%C3%A6tlan-gloymsk-men-ikki-gloymd.pdf*

samleikan, økir lívsgóðskuna, økir tilknýtið til samfelagið og fyribyrgir sosiala isolatión. Aftur at hesum útsetir tænastan tørvin á dagtilboðum og døgnplássum (pakki 2 og 3)[14], og er sostatt eisini ein fíggjarligur vinningur fyri NBH.



14 https://videnscenterfordemens.dk/da/nyhed/nu-vokser-antallet-af-cst-gruppeledere-paa-faeroeerne



# KORONA

Sum lýst gjøgnum alla frágreiðingina setti koronufarsóttin í stóran mun dagsskránna fyri virksemið hjá NBH í 2020 og 2021.

Neyðugt var støðugt at orða og tillaga tilbúgvingarætlanir og teststrategiir alt eftir, hvussu koronu-støðan var í landinum.

Hetta arbeiðið var sera tíðar- og orkukrevjandi fyri øll, bæði heimabúgvandi borgarar, búfólk, starvsfólk og avvarðandi.

Øll eiga stóra tøkk uppiborna fyri tey megnartøk, ið vórðu tikin fyri at forða smittuni at breiða seg, serliga á búeindunum.

Koronutíðin hevur lært okkum, at tað ber til skjótt at umskipa virksemið, tá ið kringumstøðurnar brádliga broytast. Fremsti lærdómurin er kanska, hvussu stóran týdning hondreinføri og reinføri annars hevur í sjúkufyribyrging og í síðsta enda fyri heilsu, trivnað og lívsgóðsku teirra eldru.

Í kjalarvørrinum av farsóttini hava øll starvsfólk fingið arbeiðsbúna við búmerkinum hjá NBH. Búnin verður skiftur dagliga og vaskaður á arbeiðsplássinum. Hetta er umráðandi átak fyri smittuverju og týðandi fyri samleikan hjá NBH, sum ein sjónligur og viðkomandi stovnur fyri heilsu og trivnað hjá borgarum í Norðoyggjum.

# STARVSFÓLKAMENNING

NBH hevur høgt fakligt støði sum part av visjónini. Eldraøkið er, sum lýst omanfyri, sera samansett, og tænastuveitingarnar krevja tí stóra fakliga vitan, men tað er torført at rekruttera starvsfólk við heilsufakligari útbúgving til økið – arbeitt verður tí støðugt við at skapa eitt hugvekjandi øki, sum eisini er við í visjónini fyri NBH.

NBH nýtir fíggjarliga og aðra orku til førleikamenning, og starvfólk hava ment seg innan demens, palliatión, parkinson, fyrstuhjálp, samskifti, sorg, etikk, vælferðartøkni, seinheilaskaða, ergonomi, pínu- og sárviðgerð, grundleggjandi røkt, rehabilitering, hjálpartól, sansaintegratión, fólkaheilsu, heilsuvísindi, umsiting av heilivági, kliniska vegleiðing, leiðslu og mong onnur øki.

Ásannandi, at fakligir førleikar eru alneyðugir, er NBH farið undir skipaða undirvísing fyri starvsfólk uttan heilsufakliga útbúgving.



# TALGILDA HEILSUSKIPANIN COSMIC

Øll løggild starvsfólk, eins og starvsfólk uttan løggilding, sum við avhending (delegatión) útinna heilsutænastur, hava skyldu til at skjalfesta sítt virksemi[15]. Tá ið eldraøkið varð flutt kommununum at umsita, skjalfestu øll við penni og pappíri, sum als ikki var nøktandi, hvørki viðvíkjandi dátutrygd, greiðari og neyvari skjalfesting og atgongd til ræltar heilsuupplýsingar.

Saman við Kommunufelagnum varð farið undir tilgongd at fáa eldraøkini við í talgildu heilsuskipanina, Cosmic, sum verður nýtt í mestsum øllum pørtum av heilsuverkinum í Føroyum, t.d. í Sjúkrahúsverkinum og kommunulæknaskipanini. Ætlanarskriv um samstarv millum Heilsu- og innlendis-málaráðið og Kommunufelagið um felags nýtslu av talgildu heilsuskipanini varð í mars 2019 undirskrivað av Sirið Stenberg vegna Sjúkrahúsverkið, og Dennis Holm vegna Kommunufelagið.

Trý eldraøki, Heilsu- og Umsorganartænastan í Tórshavnar kommunu, Roðin og Norðoya Bú- og Heimatænasta, hava verið pilotøkir í verkætlanini at fyrireika og íverkseta Cosmic, sum í 2024 varð íverksett í øllum eldraøkjunum í Føroyum, Nánd undantikið.

Tann 19. september 2022 varð Cosmic sett í verk á Sambýlinum á Heygnum[16], sum var pilotdeild í NBH, og var hetta eisini fyrsta íverksetingin á eldraøkjunum yvirhøvur.

15 https://www.retsinformation.dk/api/pdf/224420
16 https://nbh.fo/nordoya-bu-og-heimataenasta-sjosetir-talgildu-heilsuskipanina-cosmic/

## 27. HJÁLPARFÓLK OG HEILSUHJÁLPARAR




## 28. STARVSBROT Í MIÐAL, HJÁLPARFÓLK OG HEILSUHJÁLPARAR






# AVBJÓÐINGAR OG FRAMTÍÐARÆTLANIR

NBH hevur tvær stórar avbjóðingar. Tann største er tørvurin á røktarstarvsfólkum. Hin er at seta gongd á nýbygging av tíðarhóskandi bústøðum til eldri og hóskandi hølir til virksemið hjá NBH, sum kunnu miðsavna fakliga tilfeingið og minka útreiðslurnar í fíggjarliga rakstrinum av NBH.

## STARVSFÓLK

Hóast støðugt fleiri eldri uppliva heilsugóðan aldurdóm, hevur gongdin á primera økinum í heilsuverkinum, har eldraøkini eru týðandi partur, verið merkt at støðugt vaksandi kompleksiteti. Hetta stendst av, at tað eisini gerast fleiri eldri við samansettum avbjóðingum, so sum multisjúkum (fleiri ymiskum sjúkum) og umfatandi medisinskari viðgerð, demenssjúkum og styttri innleggingum, har viðgerðin ofta heldur fram í heiminum. Hetta setur stór krøv til fakligu førleikarnar hjá starvsfólkunum.

NBH vantar – eins og onnur eldraøki, bæði í Føroyum og uttanlands – starvsfólk og ikki minst starvsfólk við heilsu-fakligari útbúgving. Hetta er uttan samanbering høvuðsavbjóðingin hjá NBH.

Sum víst í innganginum er hópurin av røktarstarvsfólkum uttan heilsufakliga útbúgving vaksin, bæði í tali og ársverkum.

Mynd 27 vísir, at síðani 2019 hava verið fleiri hjálparfólk, tvs. starvsfólk uttan heilsufakliga útbúgving, enn starvsfólk við heilsuhjálparaútbúgving.

## 29. ÁRSVERK, HJÁLPARFÓLK OG HEILSUHJÁLPARAR




## 30. BÝTIÐ MILLUM STARVSFÓLK VIÐ OG UTTAN ÚTBÚGVING




Heilsuhjálpararnir arbeiða í miðal á einum hægri starvsbroti, sí mynd 28, enn hjálparfólk. Hóast hetta, eru ársverkini hjá hjálparfólkum vorðin fleiri frá umleið 2020, sí mynd 29.

Tølini eru tald í desember 2015, 2019 og 2023.

Um hugt verður at býtinum millum starvsfólk við og uttan heilsufakliga útbúgving í mun til samlaða talið av heilsustarvsfólkum (sjúkrarøktarfrøðingar, fysio- og ergoterapeutar, heilsurøktarar, heilsu-hjálparar og starvsfólk uttan heilsufakliga útbúgving) og ikki einans hjálparfólkum og heilsuhjálparum, er gongdin júst tann sama, sí mynd 30.

Býtið millum fast- og tímalønt verður mett í ávísan mun at kunna siga nakað um stabilitet og fakligheit hjá starvs-fólkunum. Tey tímaløntu eru í størstan mun starvsfólk uttan útbúgving ella starvsfólk, ið einans avloysa av og á. Um hugt verður eftir gongdini á búeindunum og teimum eindunum í NBH, sum veita heimabúgvandi borgarum tænastu, sæst ein týðiligur munur.

Á búeindunum er gongdin tann, at alt fleiri tímalønt manna størvini, sí mynd 31, meðan gongdin er tann øvuta á hinum eindunum (Heimatænasta, dagtilhald og Ven og Virka), har eru 82% av størvunum mannað við fastløntum starvsfólkum, sí mynd 32. Støðan á búeindunum er minn góð, tí her búgva fólk, ið hava tørv á høgari fakligheit allan sólarkringin orsakað sjúku ella truplar sosialar umstøður.

Danska Heilsustýrið[17] sigur, at Den ældre medicinske patient hevur aloftast – umframt ein høgan aldur – hesi eyðkenni:

- *Álvarsliga sjúku*
- *Fleiri sjúkur samstundis (multimorbiditet)*
- *Viðgerð við fleiri sløgum av heilivági samstundis (polyfarmasi)*
- *Minkandi virkisførleika, bæði likamliga og/ella sinnisliga*
- *Avmarkaða megi/førleika at taka sær av sær sjálvum*
- *Hevur tørv á tænastum frá eldraøkinum og/ella øðrum pørtum av primera geiranum ella tørv á sjúkrahúsviðgerð*

Flest øll, sum búgva á búeindunum í NBH uppfylla hesar treytir, og hava tí eyðsæð tørv á starvsfólkum við heilsufakligum útbúgvingum[18]. 2024 vísir somu gongd, og umsitingin arbeiðir støðugt við at bøta hesi viðurskifti við t.d. undirvísing, røktarfakligum dygdarmennara og at gera tað lokkandi fyri starvsfólk við hægri røktarfakligum útbúgvingum at søkja starv, sum síðan kunnu vegleiða starvsfólkum og skipa arbeiðið á búeindunum.

17 *https://www.sst.dk/da/Fagperson/Ansvarlig-medicinering/Den-aeldre-medicinske-patient/Den-aeldre-medicinske-patient*
18 *https://sjukrarokt.fo/wp-content/uploads/2022/02/FFS-Blad-2021-6.pdf*
19 *https://logir.fo/Logtingslog/19-fra-07-04-2014-um-heimataenastu-eldrarokt-vm, §10*



## NÝBYGGING

NBH hevur havt nýbygging sum part av strategiarbeiðnum síðani fyrstu kanningarnar vórðu gjørdar í 2016. Nógv orka og drúgt arbeiðið í stýrinum, umsitingini og bygginevndini hjá NBH liggur til grund fyri, at mælt verður til at fara undir at byggja:

- Tænastudepil á Viðareiði
- Eldradepil í Klaksvík

### TÆNASTUDEPIL Á VIÐAREIÐI

Flest allar tænastur í NBH, sum veitir øllum norðoyingum tænastur, liggja í Klaksvík, og tí hevur í drúgva tíð verið arbeitt við at fáa ein tænastudepil norðan fyri Fjall. Í eldralógini er orðað, at eldrasamstørvini kunnu seta ymiskar tænastur á stovn fyri at hjálpa teimum eldru at kunna *búgva í egnum heimi sum longst*[19].

Stýrið fyri NBH hevur tí tikið avgerð um, at tænastudepil skal byggjast á Viðareiði, ið fevnir um hølir til heimatænastu, dagtilhald, venjing og fysio- og ergoterapi. Ætlanin er, at Viðareiðis kommuna skal lata byggja eldraíbúðir upp at tænastudeplinum, so borgarar kunnu fáa stutta og lætta atgongd til tænasturnar í deplinum.

Ætlanin var, at hesin skuldi standa liðugur á heysti 2024, men útlit eru til, at verkætlanin verður seinkað.

## ELDRADEPIL Í KLAKSVÍK

Tað er átroðkandi tørvur á at byggja nýggjar búeindir og hóskandi hølir til tær eindirnar, sum veita heimabúgvandi borgarum í Norðoyggjum tænastur og tilboð.

Í NBH eru seks búeindir, og tríggjar av hesum, Norðoya Ellis- og Vistarheim, Sambýlið í Bøgøtu, Uppistova og Niðristova, mugu metast at vera ótíðarhóskandi karmar um bústað hjá eldri borgarum. Orsøkirnar eru bæði fysisku karmarnir, spjaðing av fakliga tilfeinginum og óskynsamur fíggjarligur rakstur, serliga hvat viðvíkur teimum smáu búeindunum.

Við einum nýggjum eldradepli í Klaksvík, sum eftir ætlan skal fevna um á leið 50 búpláss, hølir til heimatænastu, dagtilboð, stórkøk og venjing, verður mett, at fakliga tilfeingið í NBH fer at gagna borgarunum í nógv størri mun, og tað verður eisini áhugaverdari hjá fakfólki at søkja og arbeiða í einum umhvørvi, har fakligheitin er til staðar.

Harumframt ynskir NBH at skapa møguleikar fyri, at privata vinnan kann reka t.d. kafé, hárfríðkan, fótarøkt o.a. í hølunum, soleiðis at tað gerst lætt og natúrligt hjá øllum at støkka inn á gólvið og soleiðis byggja brýr millum ættarliðini, til gleði fyri bæði ung og gomul.

Ætlanin er, at NBH saman við Klaksvíkar kommunu keypir lendið til ávíkavist eldradepil og eldraíbúðir, har uppgávubýtið verður, at NBH byggir eldradepilin, meðan Klaksvíkar kommuna byggir eldraíbúðir upp at eldradeplinum. Stundum hendir tað hjá hjúnum, at annað fær røktartørv, sum kann elva til, at tað gerst neyðugt at flyta á bústovn. Avleiðingin er, at hjún, sum hava livað eitt langt lív saman, verða skild sundur. Hesum oftast óynsktu kommunalu hjúnaskilnaðum ber til at byrgja fyri við



**33. LUTFALLIÐ 16-66 / 67+ Í NORÐOYGGJUM 1985-2057**




*Hagstovan, 11. juni 2018*

eldraíbúðum, so tað ber til hjá hjúnum at búgva í nánd av hvørt øðrum, hóast annað býr á bústovni.

At skipa eldrabústaðir í størri eindir er eisini nakað, tvørgeiraligi arbeiðsbólkurin, settur av landsstýrinum í 2021, mælir til í frágreiðingini ‘Í góðum hondum´ frá mars 2022[20].

## DEMOGRAFI

Havandi demografisku framskrivingarnar og framtíðartørvin á starvsfólkum á vælferðarøkinum í huga, eru hetta stórar avbjóðingar, sum sambært frágreiðingini ‘Í góðum hondum’ og frágreiðingum hjá Búskaparráðum um ‘demografiska dráttin’[21] og ‘starvsfólk á vælferðarøkinum’[22] fara at vaksa og seta verandi vælferðarskipanir undir stórt trýst.

Framskrivingar, ið Hagstovan gjørdi fyri NBH á sumri 2018, vísa – eins og fyri alt landið – at lutfallið millum arbeiðsfjøldina og fólkapensjónistarnar støðugt minkar, so at í 2057 arbeiða góð tvey fólk fyri hvønn fólkapensjónist í mun til á leið 3,5 í dag, sí mynd 33.

Tað er serliga talið av teimum, sum eru 80 ár og eldri, ið sambært Kommunufelagnum fer at taka dik á seg næstu árini, sí mynd 34.

20 https://lms.cdn.fo/media/16448/faldari-%C3%AD-g%C3%B3%C3%B0um-hondum.pdf?s=6syX827iWxnAqYBHG7NXSTpsArM
21 https://www.landsbankin.fo/Files/Images/B%C3%BAskaparr%C3%A1%C3%B0i%C3%B0/2019%202%20buskaparfragreiding_heystid_2019.pdf
22 https://www.landsbankin.fo/Files/Images/B%C3%BAskaparr%C3%A1%C3%B0i%C3%B0/2021%20temafr%C3%A1grei%C3%B0ing-v%C3%A6lfer%C3%B0ar%C3%B8ki%C3%B0%2021.pdf



## 34. 80 ÁR OG ELDRI

ÁRLIGUR VØKSTUR Í TALINUM AV FÓLKI, IÐ ERU 80 ÁR ELLA ELDRI, 2000-2060




TAL AV FÓLKI 80 ÁR OG ELDRI OG 15-66 ÁR. INDEX, 2020=100




*Kommunufelagið*

# FÍGGING

Síðan eldraøkið varð latið kommununum at umsita, hevur fíggjarligi leisturin verið tann, at kommunurnar árliga hava fingið endurgjald frá landinum samsvarandi forskatting a pensjón, DIS og FAS, og hava rindað til kommunalu samstørvini fyri umsiting av eldraøkjunum eftir, hvussu nógvir borgarar í økinum eru 67+.

Samlaðu útreiðslurnar eru øktar munandi frá 2015 til 2023, sum sæst á mynd 35.

Orsøkirnar til nógv øktu útreiðslurnar eru fleiri. Lønarvøkstur er helst høvuðsorsøkin. Harafturat eru útreiðslurnar øktar orsakað menning av verandi tænastum og nýggjum tænastum, ið stýrið fyri NBH hevur avgjørt at seta í verk í hesum tíðarskeiðnum. Eisini er ein orsøk fólkafrøðiligu broytingarnar, har tað gerast fleiri eldri. Á myndini sæst, at talið av fólkapensjónistum í Norðoyggjum, sum NBH í høvuðsheitum veitir tænastur, veksur samsvarandi útreiðslunum.

Í Norðoyggjum fingu nakrar kommunur fyrstu tíðina avlop, orsakað av hesum býtislykli, sí mynd 36.

Enn hevur Klaksvíkar kommuna ikki fingið størri upphædd frá landinum, enn hon hevur rindað til NBH. Sum sæst í talvuni omanfyri, hevur hon árliga rindað millum slakar 4 og 11,4 mió. kr. meira, enn hon hevur fingið frá landinum.

Árligu útreiðslurnar hjá hvørjari kommunu í Norðoyggjum síggjast í mynd 37.

Afturat rakstrinum koma útreiðslur av íløgum, sí mynd 38.

## 35. ÚTREIÐSLUR (TKR.) OG 67+ÁR




| | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 62.737 | 63.474 | 67.063 | 72.726 | 74.452 | 78.996 | 84.627 | 70 | 69 |
| 67+ ár | 891 | 919 | 940 | 947 | 970 | 976 | 1.012 | 1.022 | 1.045 |

## 36. MUNURIN MILLUM GJALD TIL NBH OG GJALD FRÁ LANDINUM (TKR.)

| | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fugloyar | -47 | -111 | -35 | 28 | -21 | 47 | 37 | 68 | 59 |
| Viðareiðis | -333 | -298 | -246 | -91 | 215 | 104 | 267 | 5 | 33 |
| Hvannasunds | -476 | -8 | 234 | 376 | 250 | -9 | 412 | 428 | 155 |
| Klaksvíkar | 4.918 | 3.912 | 6.327 | 8.443 | 6.132 | 8.489 | 11.392 | 9.109 | 9.465 |
| Kunoyar | 90 | 141 | -1 | -85 | -77 | -26 | -39 | -97 | 116 |
| Íalt | 4.152 | 3.636 | 8.296 | 8.671 | 6.499 | 8.607 | 12.073 | 9.513 | 9.828 |

## 37. ÁRLIGU RAKSTRARÚTREIÐSLURNAR HJÁ HVØRJI KOMMUNU SÆR (TKR.) OG SAMANLAGT

| | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fugloy | 583 | 650 | 641 | 632 | 564 | 665 | 703 | 705 | 739 |
| Viðareiði | 2.395 | 2.601 | 3.014 | 3.373 | 3.385 | 3.326 | 3.594 | 3.917 | 3.861 |
| Hvannasund | 2.783 | 3.118 | 3.527 | 4.146 | 4.584 | 4.804 | 5.075 | 5.249 | 5.668 |
| Kunoy | 1.554 | 1.501 | 1.411 | 1.546 | 1.340 | 1.552 | 1.796 | 1.880 | 2.054 |
| Klaksvík | 48.931 | 49.173 | 52.312 | 56.988 | 58.670 | 61.929 | 67.692 | 68.468 | 73.437 |
| Húsar | 129 | 130 | | | | | | | |
| Íalt | 56.375 | 57.173 | 60.903 | 66.685 | 68.542 | 72.275 | 78.857 | 80.219 | 85.758 |



Býtið av útreiðslunum millum kommunurnar verður roknað við støði í talinum av borgarum, sum eru 67 ár og eldri tann 31. desember árið fyri. Prosentvísa býtið av útreiðslunum millum kommunurnar í Norðoyggjum er lýst í mynd 39.

Á mynd 40 sæst %-vísa gongdin viðvíkjandi gjøldum frá kommununum og brúkaragjøldum.

Brúkaragjøldini fíggjaðu fyrstu árini góð 10% av samlaðu útreiðslunum, men í 2022 fevna tey um 6,5%. Orsøkin er tann, at tað ikki bar til at broyta brúkaragjøldini, fyrr enn í 2023, tá ið kunngerðin um *Heimatænastu og gjald fyri heimatænastu, eldrarøkt v.m.* varð broytt. Kommunufelagið hevur gjørt uppskot til broytingar í brúkaragjøldunum, men sambært somu kunngerð stendur kommununum frítt at taka undir við hesum ella sjálvar áseta gjøld.

Sáttmálasamráðingar hava verið fleiri ferðir, síðan eldraøkið gjørdist kommunalt.

Í talvuni niðanfyri, sí mynd 41, sæst, at lønarútreiðslurnar eru øktar munandi í hesum tíðarskeiði, og telja lønirnar størsta partin av útreiðslunum hjá NBH.

## 38. ÁRLIGU ÍLØGU-ÚTREIÐSLURNAR HJÁ HVØRJI KOMMUNU SÆR (TKR.) OG SAMANLAGT

| | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fugloy | 206 | | | 5 | | 7 | 73 | 8 | 19 |
| Viðareiði | 846 | | | 25 | | 36 | 375 | 42 | 98 |
| Hvannasund | 983 | | | 30 | | 51 | 530 | 56 | 144 |
| Kunoy | 549 | | | 11 | | 17 | 188 | 20 | 1.864 |
| Klaksvík | 17.371 | | | 415 | | 662 | 7.075 | 729 | 52 |
| Húsar | 46 | | | | | | | | |
| Íalt | 20.000 | | | 486 | | 772 | 8.242 | 854 | 2.177 |
| **Íalt rakstur + íløgur** | **76.375** | **57.173** | **60.903** | **67.171** | **68.542** | **73.047** | **87.099** | **81.074** | **87.935** |

## 39. BÝTIÐ AV ÚTREIÐSLUM MILLUM KOMMUNURNAR Í NORÐOYGGJUM



## 40. %-BÝTIÐ BILLUM GJØLD FRÁ KOMMUNUNUM OG BRÚKARAGJØLD




## 41. LØNIR OG LØNARPARTUR AV ÚTREIÐSLUM (TKR.)

| | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lønir | 49.331 | 51.955 | 55.194 | 59.454 | 63.391 | 65.118 | 71.036 | 71.232 | 73.818 |
| Útreiðslur | 56.375 | 57.173 | 60.903 | 66.685 | 68.542 | 73.047 | 78.857 | 80.219 | 85.758 |
| Lønir, %-býtið | 87,5% | 90,9% | 90,6% | 89,2% | 92,5% | 89,1% | 90,1% | 88,8% | 86,1% |

NORÐOYA
BÚ- OG HEIMATÆNASTA

